# Kópakonan – framsýning í Ribarhúsi

**Edvard Fuglø sýnir fram 10 málningar í Ribarhúsi í hesum døgum**

UMMÆLI
*Frits Johannesen*



Heitið á framsýningini er Kópakonan, sum er ogn alra føroyinga. Úr havinum kom kópagentan trettandu nátt og læt seg úr haminum, og stóð sum ein undirføgur havgenta á malargróti stutt frá bygdini Mikladali. Tann óspilti Mikladalsdrongurin av Sunnara garði í Mikladali sá hesa undirføgru kópagentu koma við innsúðinum upp á land og lata seg úr. »Á, den sjón.«

Havið kenna vit, og havið hevur sungið um grót, flúrar, boðar og sker, so leingi hetta land hevur staðið í vátum lendi. Tað váta er í eygunum á kópakonuni – havdis, pollamjørki, skædduvindur og run í sjónum. Ùt- og innsúður og vallingar um flúðrar og flesar renna um eygnahvarmar hennara tíðliga og seint.

Mong í Fuglafirði eru í ætt við kópakonuna – hava loyvd av fitjum millum lekifingur, longutong og millum tærnar. Hetta er ílegur, sum vit eru fongd við, ið er ein partur av okkara havsins arvi. Soleiðis verður tað, so leingi føroyingar búleika á hesum oyggjum. Tað er tignarligt at vera í ætt við kópakonuna.

Edvard hevur latið gentuna í listaligan ham, hóast henda undirfagra genta er húðaleys, er hetta so innarligt, samfingið, ekspressivt, at eygnabragd ið í málningunum, dregur teg at havinum. Undir eygnalokinum eru intonktir tankar um marmennlar, sum hava reikað á havsins botni í øldir, og roynt at tikið hana til sín. Hetta eydnaðist ikki, men so eydnast tað einum dreingi av Mikladali at taka hana til sín. Hann var bara ein drongur av eini útoyggj, sum trettandu nátt verður hugtikin av kópadansinum og tí eini kópagentuni, sum bleiv unnusta hansara. Eg skilji væl, at drongurin verður skotin í kópagentuni, tá ið ein sær myndirnar hjá Edvardi. Tú verður bergtikin av henni og tú blotnar. Kærleikans trá til kvinnuna er í hesum málningum, men so er hetta bara ein kópagenta, sum er í øllum teimum føroysku kvinnunum.

Sagt verður um drong, ið svevur við víðopnum eygum, at hann skal sjólátast ella enda sínar dagar á havinum. Kópagentan á Ribarhúsi hyggur at tær við einum sjóráma av havsalti, sum er í eygnasteinunum. Hon er havsins dreymur. Hon hevur sæð allar teir føroyingar, ið sjólatnir eru. Hava rópt um hjálp millum aldudrag og aldubrot í skúmhvítum hjóma á víðopnum havi. Havsins bládýpi, dimma, døkka, svarta víðopna havið er í hesum frægu málningum. Tey opnu eyguni á teimum, sum hava drigið sín síðsta andadrátt á havinum, hava funnið frið í kópaeygunum, sum eru á Ribarhúsi.

Her er mikil skaldskapur í hesum myndum av undurføgrum hjálutum, sum hon fanglast við í sinum fangi - fiskur, skarvur, piðaður kópagrúkur, tarablað o.s.fr. Ein inn- og útsúður, sum hevur verið um hesa gentu víða um í øldir. Hon er ein havsins genta, sum rímdi av Mikladali ein dag og bleiv ogn alra føroyinga… og nú hevur Edvard Fuglø við síni list endurføtt hana og latið hana í miklan húðaleysan skaldskap.

Kópakonan er komin at vitja skyldfólkið í Fuglafirði. Vit eru ikki 20. fólk úr ætt, nei, minni enn so. Vælsignað veri henda skyldkona á Ribarhúsi. Edvard Fuglø hevur gjørt hana ódeyðiliga og takk fái hann fyri tað. Ein framúr góð sýning.



# Týsdagin skjóta vit



*Týsdagin hendir tað endiliga, sum allir norðoyingar hava bíðað í spenningi eftir. Tá verður fyrsta skotið fyri Norðoyatunlinum borðoyarmegin latið av*

*Savnsmynd*

**Fyrsta skotið fyri Norðoyatunlinum borðoyarmegin verður latið av týsdagin í komandi viku. Móttøka verður í Klaksvík, og í aðru viku væntar stjórin í pf Norðoyatunlinum, at full kraft er komin á arbeiðið**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Týsdagin verður móttøka í Klaksvík. Ein stórur dagur, tá fyrsta skotið fyri pf Norðoyatunlinum borðoyarmegin verður latið av. Móttøkan verður skipað eftir nøkulunda sama leisti sum í Leirvík, og verður tað eitt umboð fyri norðoyggjar, sum fer at trýsta á spreingiknøttin seinnapartin týsdagin.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunlinum væntar, at full kraft verður á tunnilsarbeiðinum í aðru viku, og teir sikta eftir, at komið verður ígjøgnum í juni mánaði komandi ár.

Samstundis sum hetta hendir, er nú greitt, at ognartøkan á Gerðabø er avgreidd, og sostatt kann arbeiðið upp á arbeiðsvegin tvørtur um Gerðabø byrja. Eisini skal verandi vegur út til tunnilsmunnan broytast nakað, tí hann er ikki nóg breiður til ta ferðslu, sum nú fer at koyra eftir vegnum.

Leirvíkarmegin gongur arbeiðið heilt væl. Dávur sigur, at teir eru umleið 30 metrar framman fyri uppruna tíðarætlanina. Arbeiðsgongdin har er á tann hátt, at so hvørt sum teir eru komnir einar 500 metrar fram, so reinsa teir vegbanan og leggja eitt asfaltundirlag á.

– Hetta er ein stórur fyrimunur fyri arbeiðgongdina, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í pf Norðoyatunnilin.

# Føroysk kanning misnýtt í valstríðnum í USA

KYKSILVUR-KANNINGAR
*Eydna Skaale*

Kyksilvurkanningin, sum Pál Weihe og Phillippe Grandjean løgdu fram í 1997, og sum hevur ávirkað altjóða umhvørvispolitikk í stóran mun, verður nú nýtt – ella kanska misnýtt, í amerikanska val-stríðnum. Í 2000 góðkendi amerikanska stjórnin kanning-ina, og lovaði tá at seta stór tiltøk í verk, til frama fyri umhvørvið. Serliga vóru tað nógvu koldrivnu verksmiðjur, ið dálka sera illa, sum okkurt skuldi gerast við. Men tað vóru lyftini hjá undanfarnu stjórn.

Nú eru útsagnirnar vorðnar eitt sindur øðrvísi. Leiðslan í hvíta húsinum verður nevniliga løgd undir at hava »redigerað« úrslitið av føroysku kyksilvurkanningini hjá Pál Weihe og Phillippe Grandjean. Har høvundarnir hava skrivað, at kyksilvur er skaðiligt, stendur nú við munandi veikari orðing, at kyksilvur kann kanska undir ávísum umstøðum vera skaðiligt.

Stríð hevur nevniliga tikið seg upp um 1500 koldrivin kraftverk í USA. Summi vilja, at tær skulu umbyggjast, so tær lúka markini í kyksilvurkanningini. Onnur leggja hinvegin ikki so nógv í umhvørvið, men hugsa hinvegin um milliardaupphæddirnar, sum hetta fer at kosta.

At stjórnin umskrivar eitt greitt orðað úrslit av eini kanning, man vera tí tey hugsa um pengapungin – ikki um umhvørvið. Hetta hevur fingið eitt kjak í lag, og bæði The New York Times og The Wallstreet Journal hava tikið evnið upp.

# Pál Weihe: Soleiðis er politiski heimurin

KYKSILVUR-KANNINGAR
*Eydna Skaale*



*Pál Weihe kennir seg ikki stoyttan av, at tey í Hvítu Húsunum nýta tøl í kanning hansara til egnan fyrimun*

– Eg haldi ikki, at vit skulu taka hatta so álvarsamt. Soleiðis broytist alt, tá politikkur kemur uppí leikin. Eg kenni hetta hvørki sum eitt álop á meg ella kanningina. Har eru nakrir politikarar, sum toga hvør sín veg, og tað haldi eg vera í lagið, sigur Pál Weihe.

Hann heldur, at politikararnir eru í eini ógvuliga truplari støðu, tá tað kemur til umhvørvispolitikk.

– Okkara kanning vísir á nøkur tøl, sum IPA (amerikanska umhvørvisstýrið) hevur tikið til sín, og givið politikarunum boð um. So kunnu teir gera nakað við tað ella lata vera. Tað er sera kostnaðarmikið at skula umbyggja so nógvar verksmiðjur, so teir niðurtóna vandan við útlátinum eitt sindur. Tað haldi eg vera í lagið, tí hatta er partur av politiska spælinum, sigur hann.

Pál Weihe heldur als ikki, at hatta er nakað sum gongur ímóti teirra kanning.

– Eingin hevur sagt nakað um, at okkara kanning er vísindaliga skeiv. Og eingin er gingin ímóti tølunum. Men tað eru politikararnir, sum standa við avgerðini um hvat skal gerast. Og tað er slett ikki so lætt. Skulu tølini koma niður um markið, má amerikanska fólkið gevast at eta vandamiklar vørur, sum t.d. tunfisk ella eisini mugu verksmiðjurnar umbyggjast, so útlátið minkar, sigur Pál Weihe.

Hann heldur ikki at hetta er eitt negativt kjak, tvørturímóti heldur hann, at hetta er eitt dømi um hvussu sunt og frítt amerikanska samfelagið er.

– At fólk hava loyvi til at hava sína meining og skapa eina fría samfelagsdebatt er eftir mínum tykki gott, sigur hann.

– Og tað góða við vísindini er, at um tú hevur rætt, so prógvar tað seg sjálvt um nøkur ár. Sannleikin um dálking broytist ikki, óansæð um amerikanskir politikarar royna at bleytgera boðskapin eitt sindur, sigur Pál Weihe at enda.



KT2004



KT-stevna í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl

KT2004 vendir sær til føroyskar brúkarar av kunningartøkni, og 19 føroysk fyritøkur sýna fram sín førleika.
Sjálv framsýningin við básum er í Norðurlandahúsinum. Framløgur og evnislestrar eru í Dansistovuni, og fyrilestrar verða hildnir í Útvarpshellini. Carsten Graff, rithøvundur, Preben Mejer, menningarstjóri í TDC, og danski KT-trygdarbólkurin lýsa hvør sína síðu av kunningarsamfelagnum. Í Útvarpshellini verður eisini ein pallborðsfundur, har umboð fyri vinnuna, tað almenna og myndugleikarnir viðgera útlitini hjá føroysku KT-vinnuni.

Tilmelding:
Tilmelding til KT-stevnuna 2004 fer fram á heimasíðuni www.kt.fo. Seinasta freist at melda til er fríggjadagin 16. apríl 2004. Kostnaður fyri luttøku er kr. 475 vmvg fyri hvønn dag.

Hósdagur 22. apríl kl. 10 - 18

10.00 – 10.15: Stevnan verður sett
10.15 – 18.00: Framsýningin er opin
10.30 – 18.00: Framløgur og evnislestrar hvønn hálva tíma í dansistovuni



11.00 – 12.15: Fyrilestur í Útvarpshellini við heimspekinginum Carsten Graff um evnið: Computeren – den elektroniske [illegible]
11.45 – 13.30: Kalt borð í forhøllini – tónleikur verður afturvið
14.30 – 15.45: Kjakfundur í Útvarpshellini um evnið: KT-vinnan og framtíðin. Umboð fyri vinnuna, almenna geiran, Vinnumálaráðið og KT-vinnuna luttaka
16.00 – 18.00: Rekrutteringstiltak fyri miðnámsskúlanæmingar í Norðurlandahúsinum
18.00: Stevnan letur aftur

Fríggjadagur 23. apríl kl. 10 - 17

10.00 – 17.00: Framsýningin er opin
10.30 – 17.00: Framløgur og evnislestur hvønn hálva tíma í dansistovuni
11.00 – 12.15: Fyrilestur í Útvarpshellini við danska KT-trygdarbólkinum um evnið: KT-trygd – royndir frá gerandisdegnum
11.45 – 13.30: Kalt borð í forhøllini – tónleikur verður afturvið



15.00 – 16.00: Fyrilestur í Útvarpshellini við Preben Mejer, menningarstjóra hjá TDC um evnið: Pervasive Computing – hvussu liva vit við KT í framtíðini
16.15 – 16.30: Robert Vilhelmsen, formaður í KT-felagnum tekur samanum.
17.00: Stevnan endar
18.30: Veitsla á Hotel Føroyum fyri framsýnarum og vitjandi á KT2004 við góðum mati, undirhaldi og dansi

Yvirlit yvir básarnar

1 Marine Tech
2 Kimik-IT
3 Munin
4 Bitland
5 Kall
6 Elektron
7 Hansoft
8 Sansir
9 KT-Klædning
10 Tryggingarfelagið Føroyar
11 Com-Data
12 Dynamic Paper
13 Formula.fo
14 Føroya Tele
15 Farodane
16 Simprentis
17 Kervi
18 Atlantistøkni
19 Microsoft



Hovuðsstuðlar á KT-stevnuni